# Umhvørvisvinarligur trolgrunnur



KRISTIAN ZACHARIASSEN
BIOLOGASSISTENTUR

Líggjas Hansen úr Sørvági (Mynd 1), sum andaðist í september 2004, arbeiddi í fleiri á við at gera trolreiðskap meira vinarligan móti botninum. Hann hevði ta hugsan, at trolreiðskapur, sum vanliga verður mettur at fara illa við umhvørvinum, kann broytast, soleiðis at hann blívur meira umhvørvisvinarligur.

Líggjas byrjaði í 1999 við at gera bustir, sum kundu nýtast í staðin fyri ketuna, sum bátar nýta framman fyri grunnin, tá teir fiska flatfisk. Hesar bustir fara betri við botninum, tí tær rulla eftir botninum, meðan ketan verður drigin. Tá hann hevði fingið hesar bustir at rigga, fór hann í holt við at gera ein trolgrunn, sum eisini skuldi fara betri við havbotninum, enn teir vanligu grunnarnir. Hendan grunn var Líggjas í holt við, tá hann brádliga andaðist í 2004.



Mynd 1. Líggjas Hansen.




Mynd 2. Endaligi grunnurin.




Mynd 3. Grunnur við hjólum.

Nýggi grunnurin rullar eftir botninum í mun til tann vanliga grunnin, sum antin ikki rullar ella í besta føri rullar illa eftir botninum.

Mong ymisk snið av grunnum vórðu roynd. Endaligi grunnurin líkist nógv teimum vanligu grunnunum við "hálvmánum", men hann rullar nógv betri. Enn vanta tær seinastu undirsjóvarupptøkurnar av hesum grunni og endaliga at samanlíkna fiskiskapin við ein vanligan grunn. Grunnurin (Mynd 2) vísir seg at rigga væl, hann gongur væl eftir botni og er léttur at tóva.

Millum royndu sniðini var eitt, har hjól vórðu sett á grunnin (Mynd 3). Hesi hjól vóru gjørd soleiðis, at tey altíð snaraðu sær sama veg, sum skipið tóvaði. Hetta sniðið fór uttan iva best við botninum, men trupulleikin var at fáa hjólini at halda til vánaligan botn. Eisini skulu tey stillast sera neyvt, fyri at rulla gott eftir botninum.